## Bíða eftir svari um Ancelotti

Bretskir fjølmiðlar vilja verða við, at Carlo Ancelotti verður nýggjur venjari í Chelsea, men enn eru hesi tíðindi ikki váttað. Ancelotti er í løtuni venjari hjá AC Milan, og har verður sagt, at helst verður avgerðin um framtíðina hjá Ancelotti avgjørd mánadagin. AC Milan kann við sigri um vikuskiftið tryggja sær pláss í Champions League næsta ár.



## Laudrup upp á tal í Madrid

Danski fótbóltsvenjarin Michael Laudrup er ein av teimum, sum er upp á tal sum venjari í spanska stórfelagnum Real Madrid. Florentino Perez, sum roynir at gerast forseti í Real Madrid hevur Laudrup ovarliga á sínum lista yvir møguligar venjarar. Sagt verður, at onnur feløg hava eisini verið áhugað í Laudrup – eitt nú Wolfsburg, Ajax og AZ.

07 Vestur-HB 2-3 (1-1)

# Reið um snarið hjá HB

*07 Vestur*

*HB*

**HB staðfesti í gjár oddasessin, tá liðið fekk fult í Sørvági. Teir reyðu og svørtu vóru leingi omaná, men vóru seinastu løtuna undir trýsti**

UNI HOLM JOHANNESEN
*uni@sosialurin.fo*
*FÓTBÓLTUR*



*Hóast 07 Vestur kom afturíaftur tvær ferðir ímóti oddaliðnum, var HB betri og megnaði at vinna í Sørvági*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað sá leingi út til at gerast ein avgreiðsluspurningur, men verjuvillur og reytt kort vendu fullkomiliga dystinum. HB var í gjár undir trýsti, tá tað eydnaðist at fáa fult burtur úr torføra útidystinum í Sørvági. Teir reyðu og svørtu vóru á bóltinum í stórum løtum í fyrsta tímanum av dystinum, men í tveimum førum bardi heimaliðið seg aftur í dystin.

Men HB fekk fult. Og trý stig vóru við til at staðfesta oddasessin.

### HB stýrdi

HB var greitt við yvirlutan í fyrra hálvleiki. Heimaliðið, sum fyrstu 45 minuttirnar spældi við stórari virðing fyri mótstøðuliðnum, var á egnari hálvu, og lat gestirnar úr høvuðsstaðnum stýra spælinum. Men so skjótt teir reyðu og svørtu høvdu bóltin á seinasta triðinginum av vøllinum, vóru teir trýstir. Í síðunum lá væl fyri hjá Bjarna Jørgensen og Rógva Poulsen, sum dugdu væl at søkja tómrúmið handan vongverjarnar. Men hóast fleiri innlegg – serliga úr høgru – var ongantíð vandi á ferð.

Gestirnir vóru ikki nóg beinleiðis í sínum royndum undan hvíldini. Sjáldan royndu teir at bjóða av ella leggja málgevandi avleveringina. Bólturin flutti seg heldur oftast uttanfyri brotsteigarmarkið.

Ikki fyrr enn tíggju minuttir fyri tíð, tá Páll Mohr Joensen slapp sær inn um og varð feldur, bar til. Úr ellivu metrum var Fróði Benjaminsen tryggur.

### Akselsen heldur fram

Tór-Ingar Akselsen var aftur hesaferð millum teir mest eyðsýndu á liðnum hjá 07 Vestur. Hann átti avgerandi leiklut í báðum málunum, sum heimaliðið fekk. Fyrst sendi hann í stólpan, áðrenn Milan Pejcic javnaði, og seinna málið kom eftir frálíkt einmansavrik frá Tór-Ingari Akselsen.

Hann hevur staðið seg sera væl í hesum kappingarárinum, og tað er als ikki óuppiborið, um Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevur vágamanninum í hópinum til komandi uppgávurnar.

### Deyðbóltar avgjørdu

HB legði bragdliga fyri í seinna hálvleiki, og settu alt fyri eitt heimaliðið undir trýst. Millum annað bjargaði heimaliðið á málstrikuni tvær reisur, og Hans á Lag stútaði á tvørtræið. Men tað skuldu deyðbóltar frá Rasmusi Nolsøe, áðrenn tað eydnaðist.

Tvøramaðurin sendi fyrst hornaspark í pannuna á Fróða Benjaminsen, og løtu seinni stýrdi Milan Kulic frísparkið frá verjuleikaranum í málið.

Milan Kulic var útvístur, tá eitt korter restaði í av dystinum. Miðvallarin sá tvær ferðir gult, sum var við til at seta viðleikararnar undir trýst seinastu løtuna. Men HB stóð ímóti og vann uppiborið við trimum málum móti tveimum.

## Høvdu tolið

– Jú, vit høvdu avgjørt væntað ein torføran dyst, staðfestir Sámal Erik Hentze, venjari hjá HB. Høvuðsstaðarfelagið byrjaði í framrættaðum útgangsstøði, men hóast stóra leikliga yvirvág eydnaðist tað ikki at skapa stóru málmøguleikarnar.

– Vit víst gott tol og bíðaðu eftir møguleikunum. Í seinasta triðinginum av vøllinum vóru vit ov lítið avgjørdir, men samanumtikið eri eg nøgdur.

Hvør er fyrimunurin hjá tykkum við, at tit ikki eru við í steypakappingini, nú dystarskráin er so tøtt?

– Vit hava sjálvsagt betri tíð at fyrireika okkum til komandi dystirnar, men skuldi eg valt, hevði eg heldur viljað verið við í steypakappingini, staðfestir Sámal Erik Hentze, venjari hjá HB.

**uni**

## Áttu at fingið meira burturúr

Hendrik Rubeksen úr 07 Vestur metir, at hann og liðfelagarnir áttu at fingið stig úr dystinum: – Vit høvdu betri uppiborið. Vit skjóta tvey mál, men tað er ikki nóg mikið, sigur ein vónbrotin Hendrik Rubeksen.

Tit lata HB stýra dystinum í stórum løtum. Vísa tit ikki ov stóra virðing?

– HB er oddalið og vit eru botnlið. Vit dúva upp á skjótálop, og tað er ikki nógv annað at gera, sigur Hendrik Rubeksen, sum heldur, at 07 Vestur átti at havt vunnið sær fleiri stig higartil.

– Vit skjóta mál í hvørjum dysti, men vit hava torført við at halda mótstøðuliðnum frá møguleikum, sigur framherjin.

**uni**

## Málini í Sørvági

0-1, Fróði Benjaminsen: Langt um leingi smoygdi Páll Mohr Joensen sær inn um brotsteigarmarkið við bóltinum, heldur enn at sleppa bóltinum. Við rygginum móti málinum í eini støðu, sum als ikki var vandamikil, rendi Sigtór Petersen hann um koll. Brotssparkið setti Fróði Benjaminsen trygt í netið.

1-1, Milan Pejcic: Longu minuttin seinni var Tór-Ingar Akselsen í góðari støðu í høgru, men hann sendi í stólpan. Milan Pejcic var fyrstur á bóltinum, og miðvallarin skuldi bara seta innaru síðuna á, tá hann javnaði fyri heimaliðið. Frálíkt einmansavrik av Akselsen.

1-2, Fróði Benjaminsen: Fimta hornasparkið hjá HB eftir hvíldina gav úrslit. Fróði Benjaminsen stýrdi bóltinum frá Rasmusi Nolsøe í netið.

2-2, Tór-Ingar Akselsen: Hans á Lag var í fyrstu atløgu ikki nóg avgjørdur, tá Tór-Ingar Akselsen fekk gott pláss í vinstru síðu. Síðan stóð verjuparturin hjá HB nær um bara og eygleiddi, tá Akselsen slapp fram við tveimum inn í brotsteiginum, áðrenn hann sendi framvið málverjanum.

2-3, Milan Kulic: Enn eina ferð ansaði heimaliðið ikki serliga væl mótstøðumonnunum eftir deyðbóltsstøðu. Rasmus Nolsøe sendi í høvdið á Milan Kulic, sum var tryggur framman fyri málinum.